


**Nr. 21** | ***9. oktober 2022*** | **82. árg.**

# Hvussu síggja vit Jesus?

Tá ið Andrias var vorðin lærusveinur Jesusar, fór hann at leita upp bróður sín Símun, og hann sigur við hann: „Vit hava funnið Messias.“ Hetta var sanniliga ein stór játtan.

Tá ið Filippus varð kallaður til Jesu lærusvein, finnur hann Natanael, og hann sigur við hann: „Vit hava funnið tann, sum Móses í lógini og profetarnir hava skrivað um, Jesus, son Jósefs úr Nasaret.“ (Jóh. 1,35–46). Hetta var ein knapt so stór játtan. Eyguni sóu ymiskt. Filippus sá bara tann, sum Móses í lógini hevði skrivað um, son Jósefs úr Nasaret.

Hesi orðini, sum hesir báðir menn har sáddu, endurspegla seg aftur í tí, teir siga, tá ið Jesus ger breyðundrið. Har vóru 5000 menn, umframt konur og børn. Tá vil Jesus royna Filippus og sigur við hann: „Hvar skulu vit keypa breyð, so at hesi kunnu fáa nakað at eta?“ Filippus svaraði honum: „Breyð fyri tvey hundrað denarar røkkur ikki til hjá teimum, so at hvør teirra kann fáa eitt lítið sindur.“ Men tá kemur Andrias har og sigur: „Her er ein smádrongur, sum hevur fimm byggbreyð og tveir fiskar.“ (Jóh. 6,1–13).

Aftur her er munur á eygunum, sum síggja møguleikarnar. Tá er tað, at Jesus ger matundrið, og øll verða mett. Ja, tað vera tólv kurvar av molum til avlops.

So kemur spurningurin til mín og til tín. Hvussu síggja vit Jesus við okkara andaligu eygum, tá ið vit sita á møti? Síggja vit hann, sum son Jósefs úr Nasaret? Ella síggja vit hann sum Messias, við øllum teimum møguleikunum, ið tað inniber?

*Effie Campbell.*

# Eitt orð hevði krøkt seg fast

*„Tí at Guds orð er livandi og máttmikið og hvassari enn nakað tvíeggjað svørð og fer inn ígjøgnum, til tað skilir sál og anda, liðir og merg, og dømir hugsanir og ráð hjartans.“ Hebr. 4,12.*

Ein prestur í París varð ein dagin biðin at koma at vitja eina sjúka konu. Tann sjúka hevði ikki sjálv sent boð eftir honum, men onkur annar. Tá ið prestur kom yvir hagar og bankaði uppá, kom sonurin út at vita, hvør ið tað var. Hann var ein tilkomin maður og sá garvillur út. Prestur spurdi, um tað var her, at hin sjúka búði.

„Ja, hon liggur inni her. Men hvat vilja tygum henni?“ spurdi hann ilskliga. – „Eg ætlaði mær at tosa við hana um at fáa sálina frelsta,“ svaraði prestur. Maðurin svaraði gronutur aftur, at sovorðið tvætl skuldi eingin koma til mammu sína við, og so ætlaði hann sær at smekka hurðina í.

„Nei, bíðið mær eitt lítið sindur,“ segði prestur. „Kundu tygum ikki fyrst farið innar og spurt mammu tygara, hvat ið hon sjálv vil? Um hon ikki vil hava meg inn, skal eg fara beinanvegin.“

Við ringum tannabiti læt sonurin dyrnar heilt upp og rópti inn í kamarið: „Mamma, her er ein maður, sum vil heilsa upp á teg! Vilt tú hava hann inn ella ikki?“ – Úr songini ljóðaði tað greitt og skilligt út til hansara: „Um hann kann tala um Kristi blóð, so skal hann sleppa inn, annars ikki.“

„Ja, tað er nettupp mítt evni,“ segði prestur glaður og kvikaði sær inn til ta sjúku. Hann setti seg við songina og segði, at tað gleddi seg at síggja ein sjúkling, sum hugsaði um, hvat frelsan í Kristi var verd.

„Tíverri, eg kenni ikki minsta sindrið til tað,“ segði konan, „og tað var júst tí, at eg so fegin vil tosa við tygum.“ – „Men hvussu hava tygum so hoyrt um Kristi blóð?“ spurdi hann.

„Fyri tretivu árum síðani, meðan eg var útistødd, brast eitt ódnarveður á. Eg leitaði mær skjól í einum missiónshúsi. Tað var bæði fyrstu og síðstu ferð, at eg hoyrdi Guds orð. Og einasta orðið, sum eg minnist aftur úr prædikuni, er hetta: „Blóð Jesu, sonar hansara, reinsar okkum frá allari synd.“ (1. Jóh. 1,7). Eg havi ongantíð kunnað gloymt hasi orðini. Nú skal eg doyggja, og nú havi eg brúk fyri hasum. Sigið mær frá hasum!“

Ja, hon fekk tað dýrabara orðið um Jesus og blóð hansara at hoyra, og hóast tað var heldur seint, gjørdist tað henni til æviga frelsu.

„Guds orð er livandi." Hebr. 4,12.

*„Budskab fra Naadens Rige"* – *Effie Campbell* umsetti.

# Bjargaður tvær ferðir

*„Gevið, tá skal tykkum verða givið; eitt gott, stappað, stungið høgrokað mál skulu tey geva tykkum í fang; tí at við tí máli, sum tit mála, skal tykkum aftur verða mált." Luk. 6,38.*

Tað var einaferð ein fátækur bóndi, sum búði í Skotlandi. Hann stríddist nógv fyri at útvega sær og sínum føðina. Ein dagin, tá ið hann stóð úti í haganum og velti, hoyrdi hann, at onkur rópti um hjálp.

Neyðarrópini komu úr einari mýri har í nánd. Hann blakaði amboðini frá sær og fór at renna yvir ímóti mýrilendinum. Og har, mitt úti í mýrini, stóð ein drongur. Hann var smokkaður niður í díkið, sum nú stóð um mjadnarnar á honum. Ræðslan lýsti av andliti hansara, og hann rópti og stríddist at sleppa leysur.

Bóndin, sum kallaðist Fleming til eftirnavn, bjargaði dronginum frá tí vissa deyða, og hetta kundi av sonnum gjørst ein langdrigin og ræðuligur deyði.

Dagin eftir kom ein vakur vognur koyrandi eftir vegnum og steðgaði uttan fyri smáttuna hjá bóndanum. Ein fínur og snøgt klæddur maður steig út úr vogninum. Hann segði, at hann var pápi drongin, sum Fleming bóndi hevði bjargað.

„Eg skal løna tær," segði hesin hábærsligi maðurin, „tú bjargaði soni mínum."

„Nei, eg skal einki hava afturfyri," svaraði bóndin.

Í somu løtu fóru dyrnar upp, og sonur bóndans kom út.

„Er hatta sonur tín?" spurdi tann fremmandi.

„Ja," svaraði bóndin erpin.

„So latið okkum gera eina avtalu. Eg skal geva honum eina góða útbúgving. Um drongurin líkist pápa sínum, fer hann at vaksa upp og gerast maður, sum tú av sonnum verður errin av."

Og soleiðis bleiv tað.

Árini gingu, og sonur Fleming bónda tók læknaprógv frá tí Medesinska skúlanum við St. Mary Hospital í London. Og hann helt á og gjørdist heimskendur sum sir Alexander Fleming, sum fann upp penisillinið og fekk nobelheiðurslønina.

Hvør var hin snøgt klæddi harrin? Lord Randolph Churchill.

Og hvussu kallaðist sonurin? Sir Winston Churchill. Hann gjørdist forsætisráðharri Onglands í 1940 og er størsti státsmaður í 20. øld. Hann varð víðagitin undir seinna heimsbardaga.

Einaferð, tá ið hann var á fundi við Roosevelt og Stalin, gjørdist hann sjúkur og fekk lungnabruna. Tá fór eitt flogfar úr London við penisillini, og tann sjúki forsætisráðharrin varð bjargaður.

Tað var aðru ferð, at familjan Fleming bjargaði honum. Fyrru ferðina var hann sum smádrongur bjargaður frá at drukna, og seinnu ferðina bjargaði heilivágurin honum. Tá ið tú sáar hjálpsemi og góðsku inn í livið hjá øðrum, er tað sum eitt fræ, ið veksur og verður til frukt, sum tú heystar longri niðri á lívsins vegi.

*Effie Campbell* umsetti.

# Ein sjáldsom frelsubøn

*„O, slíkt dýpi av ríkdómi og vísdómi og kunnskapi hjá Guði! Hvør órannsakandi eru dómar hansara og ósporandi vegir hansara! “ Róm.11,33.*

Seint eitt kvøldið ringdi ein ungur drongur uppá hjá einum donskum presti. Prestur bjóðaði honum inn. Drongurin var komin í syndaneyð og vildi nú verða frelstur.

Prestur las ymisk bíbliuorð upp fyri honum, sum hóskaðu í hesum sambandi. Síðani bað prestur fyri honum. „Nú kanst tú eisini biðja sjálvur," endaði prestur.

Tá bað drongurin av innasta hjarta: „Kæri Gud, ger við meg, sum tú gert við fólk, sum tú frelsir."

*Effie Campbell* umsetti.

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 9. okt. | **Tekstur:** | Áps. 2,37-47 | **Bíbliuorð:** | Áps. 2,38 |
| 16. okt. | **Tekstur:** | Jóh. 15,1-8; Gal. 5,22-23 | **Bíbliuorð:** | Jóh. 15,5 |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74




**Nr. 22** ***23. oktober 2022*** **82. árg.**

# Mótsøgnin

„Hon hevði útstaðið nógv av nógvum læknum og hevði latið út alt tað, sum hon átti; og onga hjálp hevði hon fingið, men var heldur versnað.“ (Mark. 5,26).

Vit gera nógv fyri at varðveita heilsuna. Og stendur lívið í váða, eru vit fús at geva hvat sum helst. Konan í tekstinum hevði givið alt at bjarga lívi sínum.

Dømini eru mong og ógvislig! Tað eru eingi mørk fyri, hvat ið vit eru villig at gera fyri at bjarga lívinum. Eingin prísur er ov høgur. Vit keypa fegin tann dýrasta heilivágin, fara hvar sum helst út í verðina at fáa viðgerð frá hvørjum sum helst – uttan mun til, um vit hava ráð, ella hvat ið hetta er fyri ein viðgerð, bara vit gerast frísk og verða bjargað frá deyðanum. Hesin lívsmáttur stýrir okkum øllum.

So kemur mótsøgnin. Hví gera vit hvat sum helst at varðveita tað stutta forgeingiliga lívið hjá kroppinum, meðan tað tykist, sum vit einki leggja lag í okkara veruliga og varandi lív ... sálina, okkara sanna eg – sjálvan andan í okkum?

Tú finnur ikki nakað í nakrari av heimsins religiónum, vísindi ella heimspeki, sum kemur nær í námindi av hesum tilboði:

„Tann, sum **trýr** á meg, skal **liva**, um hann so doyr.“ Jesus sigur hetta í Jóh. 11,25.

Sjálvt um hetta lyftið er einasti møguleiki menniskjans, verður tað í roynd og veru kastað aftur, ísakalt og ónervað! Fólkið rópar staðin fyri: „Latið okkum fáa eitt rættiligt tekin! Gevið okkum prógv!“

Lukas 16 svarar: „Trúgva teir ikki Skriftunum ... munnu teir heldur ikki trúgva, um onkur **reis upp frá deyðum**!“ Les vitnisburðin í Luk. 16,31.

Gud signi teg!

*„Tro og Fakta“ – Effie Campbell* umsetti.

# Er nakar tystur?

*Jesper Hougaard, sóknarprestur*

Tað var turt – skróvturt! Grasið var sviðið – dustrokið stóð upp í loft, og nógv fólk vóru í býnum. Sólin stóð høgt á luftini og bakaði niður í gøturnar, har einki lot var. Øll sveittaðu, og øll tystu. Eingin ivi um tað. Og hesa støðuna brúkar Jesus at siga tað, hann ætlar sær at siga.

Jesus stóð har og rópaði og segði: „Er nakar tystur, tá komi hann til mín og drekki!“ Jú, Jesus var óførur at brúka myndir og viðurskifti úr gerandislívinum. Handa viðmerkingin fekk fólk at steðga á og lurta. „Tystur.“ Ja, hvør var tað, sum segði tystur? Nú lurtaðu fólk eftir Jesusi.

Jesus segði: „Tann, sum trýr á meg, úr lívi hansara skulu, soleiðis sum skriftin hevur sagt, renna løkir við rennandi vatni.“ Jóh. 7,37–38.

Hetta segði Jesus um Andan, sum tey, ið trúðu á hann, einaferð skuldu fáa.

Jú, tað gjørdist hvítusunna. Heilagi Andin varð útheltur yvir lærusveinarnar, og teir vórðu fyltir av Heilaga Andanum. Soleiðis gerst hvítusunna av nýggjum, hvørja ferð ein menniskja viðgongur longsulin og tostan í lívi sínum – steðgar á og vendir sær til Jesus – trýr á hann – verður fyltur av Heilaga Andanum, soleiðis sum Guds orð vitnar um tað. Og soleiðis byrja Guds lívgevandi og leskandi streymar at flóta við livandi vatni.

Hetta nýggja lívið í Gudi kann samanberast við Genesaretvatn. Har rennur vatn bæði úr og í – mótsett Deyðahavinum, har bara rennur í. Vit skulu taka ímóti lívinum í Gudi og støðugt taka til okkum føðslu og mat. Og vit skulu rætta tað víðari til næsta okkara, so nýtt lív sleppur at næla.

Halda vit tað fyri okkum sjálv, so er tað ikki bara næsti okkara, sum missir frelsuna; men vit doyggja sjálv av tí.

Lat tað livandi vatnið streyma ígjøgnum teg og yvir til næsta tín.

*Effie Campbell* umsetti.

# Hvat kostar tað at vera trúgvur?

**Tað kostaði** Ábrahami, at kravt varð av honum, at hann skuldi ofra einasta son sín.
**Tað kostaði** Ester at seta lív sítt í váða.
**Tað kostaði** Dánjali at verða kastaður í leyvubølið.
**Tað kostaði** Sjadraki, Mesjaki og Abed-Nego at verða kastaðir í hin gløðandi ovnin.
**Tað kostaði** Stefani at verða steinaður.
**Tað kostaði** Pæturi at doyggja sum pínslarváttur.
**Tað kostaði** Jesusi at doyggja á krossinum.
**Hvat kostar tað tær?** Kostar tað tær nakað?

*Effie Campbell* umsetti.

# Eingin endurloysn í deyðanum, bert í Jesu blóði

Tá ið møtið var liðugt, stóð hann har, hesin niðurundirkomni maðurin. „Hvat er tað, tú vilt meðni?“

„At eg má fáa tað gott við Gud! Men man tað nytta nakað hjá mær?“

„Jú, tað nyttar fyri hvønn tann, sum vil. Tí tann, sum vil, kann koma og fáa lívsins vatn fyri einki.“

„Jú, men eg eri eitt ræðuligt menniskja, sum havi nógv upp á samvitskuna. Eg havi verið so ljótur og óndur móti konu mínari og børnunum, havi livað sum eitt vilt dýr. Og øll ólukkan er mín egna skyld.“

„Kortini finst bjarging fyri tær hjá honum, sum hevur borið alla skuld okkara og skomm!“

Maðurin greiðir so frá, at tað er eitt undur, at hann enn er á lívi. „Í kvøld ætlaði eg at gera enda á mær, hevði leingi hugsað um tað. Eg var komin oman til ánna og klintraði út á tromina. Men tá hoyrdi eg røddina á soni mínum – honum, sum doyði frá okkum! Eg hoyrdi hann týðiliga: „Pápi, ger tað ikki!“ Eg gjørdist so skakkur og illa við, og eg svaraði: „Nei, eg skal ikki!“

Hendingin hevði stóra ávirkan á hann. Longdin á ævinleikanum hevði skrykt hann úr svøvni. Og har og tá sakk hann grátandi saman og gav seg við lív og sál upp í hendurnar á honum, sum hevði tikið alla synd og skomm hansara á seg.

Ævinleikin er so langur, at okkara lítli heili hevur ilt við at skilja støddina á honum. Tí verður ofta hetta líknilsið borið

fram. Hugsa tær eitt fjall til støddar sum jarðarknøtturin úr gróthørðum tilfari. Túsunda hvørt ár kemur ein lítil sangfuglur og strýkur nevið eina ferð eftir eggini og hvørvur so aftur. Tá ið fjallið er uppslitið, er eitt sekund av ævinleikanum farið. Við øðrum orðum, eingin endi er á ævinleikanum.

Ein stórur trupulleiki er, at menniskju halda, at tey eiga lívið sjálv og kunnu smoyggja sær undan at bera lívsins byrðar. Men lívið er ein gáva, sum skal umsitast, og tað er okkara ábyrgd.

*Effie Campbell* umsetti.

# Ringt at takka

Ein lærari spurdi einaferð sín flokk: „Hvat halda tit vera lættari: at biðja, tá ið vit hava tað ringt og eru í neyð, ella at takka fyri tað góða, Gud gevur okkum?“

Ein løta gekk, men so rætti Astrið hondina upp.

„Nú Astrið, hvat heldur tú?“

„Eg hugsi, at tað er lættast at biðja, tá ið vit hava tað ringt.“

„Hví heldur tú tað?“

„Jú, allir teir tíggju spitølsku menninir bóðu Jesus lekja seg, men bara ein takkaði honum fyri grøðingina,“ svaraði hon, og tað var væl svarað.

Latið okkum læra at takka. Vit læra tað best, tá ið vit hvønn dag takka fyri tey smáu og stóru tingini, Gud gevur okkum.

*„Kirkeklokken“ – Effie Campbell* umsetti.

---

**Jens Garnfelt:** Tá ið tú hevur eitt kall frá Gudi, mást tú bara gifta teg við einum, sum hevur sama kall, annars kemur tú at gjalda ein alt ov høgan prís, tí tá vilja hjúnafelagarnir draga hvør sín veg.

*e.c.* ums.

---

**Sunnudagsblaðið** er eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum. Adressan er: **www.jesus4all.dk**

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 23. okt. | **Tekstur:** | 2. Kong. 5,1-14 | **Bíbliuorð:** | Róm. 10,15b |
| 30. okt. | **Tekstur:** | Matt. 28,18-20: Áps. 10,1-8 + 34-35 + 39-43 | **Bíbliuorð:** | Matt. 28,19a |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74